*Glansbílætasamlararnir*

# Maðkareiðrini afta

**Nýggja skaldsøgan hjá Jóanes Nielsen, *Glansbílætasamlararnir*, er uttan samanbering tann mest bersøgna, sum yvirhøvur er skrivað á føroyskum. Fyri nógv er hon uttan iva skelkandi. Fyri høvundan er hon ein endurspegling av lívinum, tá tú velur at siga onkrar av sannleikunum. Júst av somu orsøk rennur vakurleikin sum ein fínur tráður gjøgnum sjálvt ta mest avskeplaðu lagnuna í bókini**




Í nýggju skaldsøguni *Glansbílætasamlararnir* kagar Jóanes Nielsen inn í okkara innastu loynikrókar – og rapporterar frá maðkareiðrunum, hann sær.

SKALDSØGA
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens K. Vang*

Søgan byrjar sum ein røð av deyðslýsingum. Djalli, Staffan, Olaf og Fríðrikur, allir doyggja teir á ein ógvusligan hátt á ungum árum. Hetta eru fimm av glansbílætasamlararnum í árgangi 52 á Sankta Frans Skúla í Havn, sum allir búgva á Landavegnum. Har býr Kári eisini, sum so ella so fylgir glansbílætasamlararnum alt lívið. Tá tann seinasti av teimum doyr, er tað Kári, sum skrivar minningarorðini – ella rættari hugleiðingarnar um glansbílætasamlararnar, sum plagdu at sita aftan fyri høsnarhúsið hjá nunnunum í fríkorterinum og bíta um bíløt ...

**Maðkareiðrini**

*Við einum slíkum bygnaði er tað freistandi at gita, at hugleiðingar hjá Kára sostatt gjørdust skaldsøgan hjá Jóanes Nielsen. Er Glansbílætasamalararnir eitt slag av fiktivum endurminningum?*

- Tað er rætt, at søgan um teir tekur støði í árgangi 52 á Sankta Frans Skúla, har eg sjálvur gekk. Og tað er eisini rætt, at fleiri av dreingjunum doyðu á ungum árum uppá ein sjáldsama dramatiskan máta ella gingu til grundar, tí teir ikki rættiliga kláraðu at liva. Tað er lopfjølin til skaldsøguna, men har frá eru bæði teir og hendingarnar í bókini fiktivar. At eg valdi teir kemst av, at teir saman skapa eitt breitt fundament, sum gav mær møguleika at koma víða um í eini lýsing av hasum tíðarskeiðinum og hasi síðuni av lívinum. Ambitiónin hevur also ikki verið at gera ein ultimativan tvørskurð av føroysku psykuni. Søgan um glansbílætasamlararnar er bara ein partur av sannleikanum um, hvussu lívið hjá summum av okkum kann laga seg.

*Ein óvanliga myrk síða av lívinum, má man siga ...*

- Tja, tað er so spurningurin. Tað tykist sum, at tá tú koyrir gardinurnar frá í lívinum, líka mikið hjá hvørjum, so finnur tú oftast okkurt maðkareiður. Tá man skrivar eina bók, sum hesa, og hevur tær ambitiónir, sum eg havi, og rópar man seg hartil ein realistiskan høvund, so má man taka alt tað við, sum hoyrir tí veruliga heiminum til. Eg kann ikki loyva mær at sita og redigera, so at eitt glansbílæt kemur fram. Eg má fáa tað ordiliga bílætið fram, ella tað, sum í øllum førum sigur rættiliga nógv.

Hinvegin, ein rithøvundur, sum roynir at taka kappingina upp við veruleikan, dumpar altíð. Bæði tí veruleikin hvørja ferð trumfar nógv hægri og nógv grummari. Og tí ongin trýr einum rithøvunda, sum bara hópar grumheit oman á grumheit. Tað, sum kemur í eina bók, er sum oftast ein modererað og ein vakrari útgáva av lívinum. Sum rithøvundur setur tú eisini tingini saman á ein hátt, so tey rigga listarliga. Øll lív eru áhugaverd, tú skalt bara duga at fáa tað fram. "Sanna geniið býr jú í at fáa deytt stoff at syngja". Spurningurin er so, um eg havi dugað tað í hesi bókini.

**Ættarliðssøga**

*Hetta fundamentið, hesir glansbílætasamlararnir, góvu tær eisini møguleika at skriva søguna um títt ættarlið. Var tað eisini ein av ambitiónunum við bókini?*

- Ja, avgjørt, og eg má viðganga, at eg eri serliga spentur uppá, hvat lesarar úr míni generatión fara at siga til bókina. Samstundis er hon ein roynd at geva eina lýsing av býnum, eg eri vaksin upp í.

Tað vísir seg, at Havnin hevur eitt ávíst potentiale, tá tað snýr seg um list. Í føroyskum skaldskapi grør tað næstan organist burtur úr húsum og gøtum í Havnini. Í so máta er *Glansbílætasamlararnir* ein ættarliðssøga, sum plaserar seg í eina langa tradition í føroyskum bókmentum.

Málstríðið í Hoydølum stendur jú rættiliga sentralt í søguni hjá hesum ættarliðinum. Men í tíni útgávu fær tann ofta nakað romantiseraða myndin av tí nakrar álvarsligar skøvur.

- Ja, tí yvirhøvur, tá nationalisma fer uppá kók, er sum oftast ein steinur í skónum onkustaðni. Man vinnur sigrar, men onkur má altíð gjalda prísin. Øll, sum onkusvegna verða rakt av tjóðskaparstríðnum í bókini blíva sjúk og visna. Ikki tí, nationalisma kann eisini verða katalysator fyri nógvum stórbærum. Men hon kann sannliga eisini verða skaðilig – tað er altíð handan dualisman ...

